# Føroya Tele kann nú geva avsláttur


Andras Róin og Føroya Tele kunnu nú geva teirra stórkundum tilboð um avsláttur á fastnetøkinum. Mynd: Heri á Rógvi

**Føroya Tele fekk týsdagin loyvi til at veita sínum kundum avsláttarskipanir. Hetta bert Kall kunna gjørt higartil. Tað er nú nógv, sum bendir á, at kappingin á fastnetøkinum veruliga fer at harðna**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Tað gav ilt av sær, tá ið stjórin fyri Føroya Tele, Andras Róin, í bløðunum í gjár skrivaði nakrar viðmerkingar í sambandi við tann komandi KT-vinnupolitikkin. Tað var einamest í sambandi við, at ein sokallað støðumynd var gjørd av føroyska fjarskiftismarknaðinum. Kanningin bar eisini saman við onnur lond. Niðurstøðan av støðumyndini var. at serliga GSM og fastnet í Føroyum liggja ógvuliga ovarliga í prísum.

Tað var í støðumyndini fleiri ferðir víst á, at smærri lond sum Ísland og Luksemburg hava rættiliga góðar prísir at vísa á.

Ì sambandi við støðumyndina av marknaðinum, hevur Fjarskiftiseftirlitið eisini alment heitt á Føroya Tele um lække sínar prísir á GSM-økinum.

Tað, at Føroya Tele og Fjarskiftiseftirlitið fara upp at táttast er tó ikki nakað óvanligt. Hóast hetta, so gav Fjarskiftiseftirlitið týsdagin Føroya Tele loyvi til at geva avsláttur til sínar stórkundar.

## Avsláttur

Tað vakti ans, tá ið Vinnumálastýrið skifti veitara á fjarskiftisøkinum frá Føroya Tele til Kall. Orsøkin var einføld: Kall kundi bjóða Vinnumálastýrinum eitt betri tilboð enn kappingarneytarnir, Føroya Tele. Orsøkin til hetta var, at Kall kundi bjóða avsláttur, t.e. ein mondgaravsláttur, har Vinnumálastýrið, eins og aðrir stórkundar, kundu fáa ein avsláttur áljóðandi ein ávísan prosentpart.

Føroya Tele hevur í longri tíð roynt at fingið eina avsláttarskipan, men hetta hevur ikki eydnast teimum. Og tó, týsmorgunin kundi leiðslan á Føroya Tele fegnast um, at teir loksnins og eftir tógvið stríð hava fingið loyvi til at veita sínum kundum avsláttur. Tað, sum talan er um, er ein sokallaða mongdaravsláttarskipan. Tey, sum fáa gleði av hesum vera stóru kundarir hjá Føroya Tele.

- Vit fara nú í næstum at bjóða okkara stórkundum eitt tilboð upp á eina avsláttarskipan. sigur Andras Róin.

Stjórin fyri Føroya Tele greiðir frá, at teir vórðu noyddir at fara undir at sundurskilja teirra roknskap, og hetta er als ikki eitt løtuverk. Tað var ikki fyrr enn, at teir høvdu latið Fjarskiftiseftirlitinum henda roknskapin, at teir fingu loyvi til eina avsláttarskipan.

Sum áður nevnt, so hava Fjarskiftiseftirlitið og Føroya Tele eisini áður tikið málið um avsláttarskipaninar upp. Hóast Føroya Tele nú hevur fingið loyvi til eina avsláttarskipan, so var tað als ikki hetta, ið fyritøkan ætlaði sær frá byrjan av.

Føroya Tele hevur søkt um eina avsláttarskipan, sum eisini samenir fleiri partar av virkseminum hjá fyritøkuni. Hetta er nakað tað sama sum tá ið tryggingar verða savnaðar saman í eina trygging, og tann einstaki tryggingartakarin fær ein avsláttur.

Hetta hevur ikki eydnast Føroya Tele, og málið er nú komið so langt, at tað er kært fyri einari serligari kærunevnd fyri Fjarskiftiseftirlitið. Enn er eingin avgerð komin frá nevndini.

- Vit eru sjálvandi fegnir um at hava fingið hesa avsláttarskipanina, men hetta broytir ikki tað, at vit framvegis ynskja okkum hina avsláttarskipanina eisini, sigur Andras Róin.

Orsøkin til, at Føroya Tele ikki hevur kunnað fingið avsláttarskipanina góðkenda er, sambært Andras Róin, tann, at Fjarskiftiseftirlitið ikki hevur mett roknskapin hjá Føroya Tele nóg væl sundurskildan. Samstundis sum tað, sambært stjóranum, hevur verið torført at leggja ymisku tænasturnar saman til eitt avsláttartilboð.

## Ábreiðslur

Í Sosialinum og Dimmalætting mikudagin stóð at lesa viðmerkingar frá Andrasi Róin. Hesar vórðu skrivaðar í sambandi við, at Fjarskiftiseftirlitið hevur gjørt hesa góðu støðumynd.

Andras Róin sigur í sínum viðmerkingum, at tað kann tykist eitt sindur løgið, at kanningin samanber so at siga tvørtur um mark, har fleiri feløg verða blandaði saman til eitt.

Andras leggur afturat sínum viðmerkingum, at hóast eingin hevði ásett teimum tað, so høvdu prísirnir av sær sjálvum fari niðureftir.

- Tað er eitt klárt aðalmál hjá Føroya Tele at lækka okkara prísir, og vit hava eisini lækkað okkara prísir, sigur Andras Róin.

Í løtuni vinnur Føroya Tele, eins og aðrir útlendskir veitarar, nógvir pengar á GSM-økinum.

- Vit hava gjørt rættiliga stórar íløgur innanfyri GSM-øki, og hetta vilja vit sjálvandi hava innaftur, og vit skulu helst eisini hava ein vinning, soleiðis at vit kunnu gera nýggjar íløgur, sigur Andras Róin.

Eftir hvat skilst so liggja tað rættiliga nógvar og stórar íløgur fyri framman hjá Føroya Tele, og tað kann verða trupult hjá teimum at gera hesar, um myndugleikarnir leggja seg so nógv út í hetta við kappingini.

- Endamálið við kapping er at geva kundanum betri og bíligari tænastur. Endamálið við kapping er ikki at tvinga kapping, sigur Andras Róin at enda.

# Vænta semju í dag

SEMING
*Stefan í Skorini*

Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið og kommunurnar hinumegin samráddust framvegis mikudagin á middegi. Partarnir hava verið á Hotel Hafnia síðan mánamorgunin, tá semingsmenninir kallaður partarnar samanaftur.

Jákup í Gerðinum, semingsmaður, segði, at hann væntaði, at partarnir fóru at skriva undir eina semju mikudagin, tá vit høvdu hann í telefonini á middegi mikudagin. Jákup í Gerðinum roynir at finna semju saman við Gloriu Kalsø.

Hann leggur tó dent á, at semja enn ikki er funnin.

– Tað hevur gingið framá í smáum fetum, men enn vantar nakað í, segði Jákup í Gerðinum, sum væntaði at sita nakrar tímar afturat.

Tá allir smálutir eru komnir uppá pláss er bara eftir at fella semjuna niður á pappír, sum partarnir skulu undirskriva.

Vónandi kunnu vit í blaðnum í morgin bera fleiri tíðindi um semjuna, sum semingsmaðurin væntar er komin undir land mikukvøldið.

Pedagogfelagið hevur verið í verkfalli í meira enn tvær vikur, og foreldur eru farin at ótolnast.


Endamálið við kapping er at geva kundanum betri og bíligari tænastur. Endamálið við kapping er ikki at tvinga kapping, sigur Andras Róin í sambandi við, at Fjarskiftiseftirlitið hevur gjørt eina støðumynd av fjarskiftismarknaðinum í Føroyum



Tað grør um gangandi fót í Nes kommunu:

# Skattainntøkurnar øktar 13 milliónir krónur í átta ár

*– So hvørt, sum virksemið í kommununi tók seg uppaftur, fyrst og fremst við Fiskamarknaði Føroya og seinni, tá ið Fiskavirking lat virkið uppaftur, vendist gongdin, sigur Súni í Hjøllum*



**Í 1992 vóru skattainntøkurnar hjá Nes kommunu komnar uppá 16 milj. krónur. Árið eftir gongur av skriðuni í kommununi og samfelagnum annars, og skattainntøkurnar minka niður í 10-11 milj. krónur, hóast skattaprosentið fer úr 16,5% uppí 23%. – Vit vóru í dýrastu neyð, sigur Súni í Hjøllum, bygdarráðslimur.**

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Tá ið tað gongur væl, hava vit menniskju lyndi at halda, at tað bara fer at ganga væl. Gongur illa, er ilt at fáa eyga á glottarnar; vit gerast dapurskygd og duga illa at ímynda okkum, at gongdin nakrantíð vendir. Men søgan sigur okkum, at soleiðis hongur tað vanliga ikki saman.

Í aðrari grein í blaðnum í dag vísa vit á, hvussu gongdin í Nes kommunu hevur verið seinastu árini; í 1993 var øskukalt, men bert fá ár seinni byrjaði kommunan at blóma, og í dag er hon sera væl fyri.

Súni í Hjøllum, bygdarráðslimur og formaður í teknisku nevnd, sigur, at kommunan sá sínar torførastu dagar í nýggjari tíð í 1993.

– Inntøkurnar av kommunuskattinum vóru komnar uppá 16 milj. krónur í 1992, men tá ið alt kollapsaði í 1993, minkaðu inntøkurnar niður í 10-11 milj. krónur, hóast skattaprosentið fór úr 16,5% uppí 23%. Høvdu vit ikki økt skattaprosentið hetta árið, høvdu inntøkurnar endað niðri á 8 milj. krónum. Vit vóru tískil í dýrastu neyð, sigur hann.

## Vend kom í

– Men so hvørt, sum virksemið í kommununi tók seg uppaftur, fyrst og fremst við Fiskamarknaði Føroya og seinni, tá ið Fiskavirking lat virkið uppaftur, vendist gongdin. At fiskiskapurin batnaði og gjørdist góður árini eftir, hevði eisini stóran týdning fyri skipini og fiskimenninar í kommununi.

Súni sigur, at sum út sær í dag, veksa skattainntøkurnar alla tíðina, og tað er gott tekin, tá ið skattaprosentið hevur verið tað sama seinastu 4-5 árini.

– Í fjør mettu vit, at vanligi kommunuskatturin fór at vera 20,9 milj. krónur í ár, men nú árið næstan er umliðið, verður talan helst um einar 24 milj. krónur.

Hann vísir á, at fíggjarætlanin hjá kommununi varð samtykt síðsta mánadag, og her verður mett, at skattainntøkurnar verða 24,9 milj. krónur í 2002.

Somuleiðis er samtykt, at barnafrádrátturin hækkar úr 3.500 krónur uppí 4.000 krónur.

Skattaprosentið í Nes kommunu er 19,9%.

## Lítil íløgukvota

Súni heldur, at íløgukvotan hjá kommununi er lítil, men hon byggir - eins og hjá hinum kommununum - á fólkatalið, sum í dag er tætt upp ímóti 1200.

– Okkara »kvota« fyri komandi ár er 4,2 milj. krónur. Av hesum hava vit sett 1,7 milj. krónur av til útstykkingina millum Gadd og Heygar, og vit vóna, at koyrandi verður ímillum um eitt ár ella so.

Bygdarráðslimurin sigur, at sambært ætlanini verða rættiliga nógv grundstykkir millum Gadd og Heygar.

– Her er gott pláss, eisini til síðuvegir og grundstykkir uppat teimum, sigur hann.

Av øðrum íløgum kann nevnast, at 2 milj. krónur eru settar av til eldrasambýli, sum kommunan fer at byggja norðanfyri Føroya Banka. Skitsuprojekt er til viðgerðar í kommununi í hesum døgum.

– Vit vóna, at jørðarbeiðið og partar av betongarbeiðnum verður gjørt komandi ár fyri hesar pengarnar. Men hetta røkkur langt frá til alt projektið. Enn er ikki avgjørt, hvussu nógv verður bygt, men roknast kann við, at kostnaðurin verður umleið eina miljón fyri hvørt búfólkið, sigur Súni.

Ein hálv miljón er sett av til havnalagið, og her verður serliga talan um asfaltarbeiði, sum er í gongd og verður gjørt um árskiftið.

Nevnast kann eisini, at Nes kommuna í fíggjarætlanini fyri 2002 hevur sett 2 milj. krónur í grunn til víðking av skúlanum og 1 milj. krónur í grunn til vetrarfriðing.

Seinastu fýra árini hevur kommunan sett tilsamans 10 milj. krónur í grunn til víðking av skúlanum.


*Í dag er Nes kommuna skuldarfrí og eigur 11 milj. krónur á bók. - So her er nógv hent, síðan vit í 1993 vóru í dýrastu neyð, sigur Súni í Hjøllum, bygdarráðslimur.*

## Kommunan skuldarfrí – 11 milj. krónur á bók!

Tá ið havt verður í huga, at kommunan sambært Súna í Hjøllum var í »dýrastu neyð« í 1993, men í dag er skuldarfrí og eigur 11 milj. krónur á bók, man hetta kennast sum ein góður dreymur.

– Undan seinasta kommunuvali rindaðu vit alla skuldina í einum, sum kommunan hevði. Talan var um 14-15 milj. krónur, sum kostaðu kommununi hálva miljón í rentum um árið, sigur bygdarráðslimurin at enda.